# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Fyrrverandi politikari og fekfelagsleiðari áttati



Hósdagin rundar Dánjal av Rana í Trongisvági tey áttati. Hóast virkin á flestu samfelagsøkjum kenna vit Dánjal best frá drúgva politiska- og fakfelagsliga virkseminum, sum hann var virkin í á Tvøroyri fram móti aldarmótinum.

Virkna arbeiðslív sítt byrjaði Dánjal sum unglingi í kolaminunum í Rangabotni. Seinni koyrdi hann gravkýr, m.a. í sambandi við anlegsarbeiði til loranstøðina á eggjunum, SEV útbýggingina í Botni og við Hovsvøtn og tá útbyggingin fyri flakavirkið á Tvøroyri varð gjørd.

Í 1971 gjørdist Dánjal virkin í fakfelagsarbeiði sum nevndarlimur og skrivari í arbeiðsmannafelagnum Fylking á Tvøroyri, har hann var formaður í árunum 82-97. Í 1977 varð hann settur í starv sum stjóri á løngjaldsstovu Fylkingar, og røkti hann hetta í 20 ár.

Fyrsta fólkavalda starvið fekk Dánjal í 1959, tá hann varð valdur í líkningarnevndina á Tvøroyri. Í hesum virkaði hann til 1980 og var formaður frá 1969.

Dánjal varð fyrstu ferð valdur býráðslimur á Tvøroyri í 77, og røkti hann hetta starvið í samanlagt 24 ár- harav var hann borgarstjóri frá 1985- 1992.

Í Froðbiar sóknar javnaðarfelag var Dánjal nevndarlimur í 45 ár, av hesum var hann formaður í 12 ár.

Hugsjónarliga og politiskt er Dánjal kendur frá stríðnum fyri sosialum rættvísi. Her var avgjørda hugsan hansara at arbeiðarastættin, bæði beinleiðis og gjøgnum politisku umboðan sína, átti sín lutvísa part í bæði vinnutólum og harav skaptum vinningi. Henda sannføringin sermerkti vinnulívið á Tvøroyri, øll tey árini hann og javnlíkar hansara ráddu fyri borgum. Tá tað privata gavst á fótum, fingu teir, frá vanliga borgaranum, til vega partapening og lótu byggja flakavirki og trolarar, sum øll kreppuárini veittu tvøraborgarum líkar vinnumøguleikar.

Sum blaðungur gjørdist Dánjal andaliga virkin, og Gudstrúgvin og samfelag teirra Heilagu hevur verðið ein grundleggjandi partur av lívinum, ein partur, sum skilliga sæst aftur í fótasporum hansara.

Dánjal giftist í 1949 Aslaug, sum hevur verið honum ein trúgvur stuðul øll hesi mongu ár. Tey eiga 4 børn, Petur Karl, Bjørg, Jenis, og Varnu. Abbabørnini eru 7.

Føðingardagurin verður hildin í samkomuhúsinum Salem á Tvøroyri frá kl. 19.00 hóskvøldið. Har eru øll vælkomin at heilsa Dánjali.



Kiwanis-klubbin, Tórshavn:

## Selja jólatrø til vælgerandi endamál

Aftur í ár eru tað limir frá Kiwanis-klubbanum Tórshavn, sum selja jólatrø, har allur vinningurin av søluni fer til vælgerandi endamál í Føroyum.



HJÁLP TIL AT FESTA HUGSAN Á BLAÐ
Føðingardagar · Starvsdagar · Minningarorð

**Hært tú ikki tikið teg saman?**
Hugsar tú um at seta eina heilsan í blaðið í sambandi við onkran merkisdag í familjuni ella hjá arbeiðsfeløgum. Her verður eitt nú hugsað um rundar dagar, føðingardagar, gullbrúdleyp, starvssetanir, jubileum á arbeiðsplássinum o.s.v.

Set teg í samband við okkum. Um vit fáa nøkur stikkorð, so kunna vit í felag skriva greinina, sum verður meira áhugaverd at lesa, tá ið tit senda okkum eina mynd við. Tað sama kann gerast í samband við minningarorð.

Sosialurin "Nøvn í vikuni" Tel.341800 / 216135 Teldupost: maggi@sosialurin.fo

Hans Petur í Gomlustovu Kjærbo, Vágur:

## 25 ára starvsdag hjá Farvandsvæsenet



2. desember 2005 hevði Hans Petur Kjærbo yvirvitapassari í Vági 25 ára starvsdag hjá Farvandsvæsenet, Færøernes Fyrdistrikt.

Hans Petur er 50 ára gamal og sumbingur. Líðugur við reaskúlan var hann sjómaður í eini trý ár. Síðan arbeiddi hann eina tíð hjá DFDS í Esbjerg og seinni hjá Byggifelagnum Waagstein í Havn.

2. juni 1980 var Hans Petur settur í starv hjá Farvandsvæsenet. Hann byrjaði í Akrabyrgi, har hann var til 1995, tá vitin varð automatiseraður.

Síðan hevur hann arbeitt við teir ymisku vitarnar kring landið, serliga á Borðuni, har hann hevur verið fast 5. hvørja viku, og á teimum størru vitunum í Mykinesi og Akrabyrgi.

Basin hjá vitapassarunum í Føroyum hevur í nøkur ár verið á Loranstøðini á Eiði, og frá 1. januar 2006 er Hans Petur settur sum økisvitapassari, har hann kemur at arbeiða fast á Eiði.

Í hesi 25 árini, Hans Petur hevur verið í starvi, hevði hann farloyvi í hálvt ár í 2001, tá hann var kokkur við nótabátinum Saksaberg.

Í 1983 giftist Hans Petur við Ritu, f. Tausen, úr Vági. Tey eiga trý børn: Linda, 23 ár, og tvíburarnar Andras og Allan, sum eru 20 ára gamlir.

**Litmyndir av brúðarpørum í** Vikuskiftis Sosialurin

Sum nakað nýtt seta vit nú allar myndir av brúðarpørum, sum vera sendar til til teigin "Heilsanir", í Vikuskiftis Sosialin í **litum**.

Brúðarmyndirnar koma undir somu treytir sum aðrar myndir til "Heilsan-ir", t.v.s. at tær kosta 30 kr.

***Síðsta freist at lata brúðarmyndirnar inn er hósdag kl. 12.00***

**Sosialurin**

## Tøkk

Vit takka hjartaliga øllum fyri sýnda samkenslu tá kæri maður, pápi, verfaðir, abbi og langabbi okkara

**Leif Lamhauge, Tórshavn**
Leif í Dalinum

andaðist og varð jarðaður.

Tøkk fyri blómur, kransar, heilsanir og gávur til Føroya Felag móti Krabbameini.

Tøkk til tykkum øll, sum á ymiskan hátt hjálptu til við jarðarferðina og við ervið í Pálsstovu. Takk til talarar, berarar, organistar, Dupultkvartettina, sangarar í kirkjuni og á grøvini. Tøkk øll tit, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað her. Hjartaliga takk øll somul.

*Familjunnar vegna*
**Sanna**
**Sigrun, Marjun, Sigurd og Margit**